# Einki úrslit í próvtøkuni

**Finaluroyndin á ólavsøku gav einki svar upp á, um hetta var rætta loysnin ella ikki**

FÓTBÓLTUR
*Jóannes Hansen*



Nú skal broytingin standa sína roynd. Hetta var yvirskriftin á heilsanini, sum FSF bossurin, Torleif Sigurðsson, hevði til fótbólts áskoðararnar ólavsøkudag.

Yvirskriftin sipaði til, at finalan ímillum B36 og KÍ skuldi geva svar uppá, um avgerðin at seta finaluna um løgmanssteypið á skránna ólavsøkudag, var heppin ella ikki heppin.

Svarið til spurningin skolaði burtur í regni og vindi. Tað varð tosað um, at møguleiki var fyri, at øll seks túsund setrini fóru at verða fullsett. Tað vóru ikki fólk í fleiri enn triðja hvørjum setri.

Áskoðararnir komu ikki fyrrenn tætt uppundir dystarbyrjan ella seinni enn so. Hetta og vánaliga veðrið høvdu við sær, at rómin, ið tað var ætlanin, at tónleikur frá popporkestrum og hornorkestrum skuldi mynda saman við fimleikarum, á ongan hátt rakk málinum. Í hátalarunum ljóðaði, at løgmaður undan dystinum skuldi heilsa upp á spælararnar. Okkurt mundi vera galið við samskiftinum ella minninum, tí løgmaður kom ikki fyrrenn 1. hálvleikur var hálvrunnin.

## Fótbóltsspælið

Nógv av omanfyri nevnda hevði heilt víst verið øðrvísi, um veðrið hevði verið við og ikki so dyggiliga ímóti.

Fyri fótbólts undirhaldið var stóri spurningurin, hvussu væl spælararnir og harvið liðini vóru fyri. Tann spurningin fekst einki svar uppá, tí líkindini vóru so út av lagi vánalig. Men hóast vánirnar ikki vóru av teimum bestu, so boðaðu nógvu persónligu mistøkini frá, at dystarvenjingin ikki var tann, sum hon helst skuldi verið í finaluni.

Tá finalan fyri nøkrum árum síðani var flutt frá fyrst í august og til síðst í juni ella fyrst í juli, so var grundgevingin tann, at undan summarsteðginum vóru spælararnir í væl betri dystarvenjing, enn teir vóru fyrst í august, tá eingir dystir hava verið á skránni í ein mánað.

Spurningurin er so, um finalan skal flytast aftur frá ólavsøku og ein mánað fram, um eingin summarsteðgur skal vera í landskappingini – akkurát sum teir gera í Íslandi og Noregi – ella um ein stuttur summarsteðgur skal vera eftir ólavsøku. Tá tað snýr seg um tað fótbóltsliga, er tað neyvan heppið, at finalan er á skránni, eftir at tað ikki hevur verið telvast í landskappingini í ein mánað.

## Veðrið

Omanfyri nevndu spurningarnar ber tað til at tosa um og gera metingar og niðurstøður um. Verri er tað, tá tað snýr seg um veðrið. Tað ber til at tosa um veðrið, men tað ber ikki til at gera nakað við veðrið.

Spurningurin er kortini, um tað ikki ber til í skránni at leggja upp fyri, at veðrið ikki er til at spæla finaluna. Ólavsøkudag hoyrdist í Gundadali, at møguleikin hevði verið upp á tal, at finalan skuldi útsetast til mánakvøldið. Kortini varð spurningurin ikki viðgjørdur.

Men tað hevði kanska verið upp á sítt pláss – um ætlanin er at halda fram við at spæla finaluna á ólavsøku – at umrøtt, um finalan skuldi verið á skránni ólavsøkuaftan. Áhugin fyri dystinum hjá HB ímóti Hvidovre var so mikið lítil, at tað er nógv, sum bendir á, at vinardystir av hasum slagnum skjótt verða ein saga blott.

Um finalan var á skránni ólavsøkuaftan, so hevði sami møguleiki verið fyri útseting, sum er í kappróðrinum. Fyri einari fjórðings øld síðani gjørdu teir í Róðrarsambandi Føroya av, at allir kappróðrarnir skuldu vera leygardagarnar á stevnunum. Frammanundan var tað annars vanligt á fleiri stevnum, at kappróðurin var á skránni sunnudag.

Orsøkin til broytingina hjá RSF var, at um tað ikki viðraði at rógva leygardag, so skuldi vera møguleiki at útseta róðurin til sunnudag. Hetta hevur onkuntíð verið neyðugt, men tíbetur hevur tað verið sera sjáldan.

# Smekkar til

**Jens Kristian Hansen var sjálvandi ovurfegin um einsamalla málið, sum tryggjaði B36 steypasigurin í 2001**

MATCHVINNARIN
*Jákup Mørk*

Royndasti leikarin hjá steypavinnarunum úr B36 er uttan iva Jens Kristian Hansen. Tað var eisini hann, sum syrgdi fyri einasta málinum í dystinum, men sjálvur helt landsliðsmaðurin ikki, at hetta hevði nakað við royndirnar at gera.

- Tað veit eg ikki. Tað er altíð gott at skjóta mál. At tað so er til 1-0 í eini steypafinalu, ger tað ikki verri. Tá verður tað enn meira hugaligt, segði Jens Kristian sjálvur eftir dystin.

## Týdningarmikil

Hetta við at skjóta týdningarmikil mál er annars ikki nakað fremman fyri Jens Kristian. B36 viðhaldsfólkini minnast ivaleyst, at tað millum annað var einum máli frá honum fyri at takka, at árstalsfelagið í 1997 kundi gerast føroyameistari í Vági. Spurdur um hetta ikki kann hava nakað við týdningin av royndum at gera, er málskjúttin tó ikki so vísur.

- Sjálvandi er tað deiligt at skjóta slík mál, men tað hevur ikki so nógv við hatta at gera. Mann roynir bara at vera á staðnum, og so smekka til, um møguleikin er til staðar, sigur Jens Kristian Hansen at enda.

# Serstøk finala

**Formaðurin í B36 var sjálvandi fegin um sigurin, men hann tóktist eisini sera fegin um, at steypafinalan nú verður leikt á ólavsøku**

FORMAÐURIN
*Jákup Mørk*

Týdningurin av at vinna steypafinaluna er sera stórur í B36-húsinum. Í øllum førum vóru tað orðini, sum formaðurin hjá steypavinnarunum, Kristian á Neystabø, hevði at siga eftir dystin.

- Steypafinalan hevur altíð havt nógv at siga. Serstakliga hevði hon nógv at siga í ár, tí nú hevur so leingi verið tosað um at gera finaludystin til tað, sum hann er uttanlands. Í ár varð hon so leikt á ólavsøku, og tí haldi eg, at finalan í ár var nakað heilt serligt. At veðrið so bleiv, sum tað bleiv, er sjálvandi keðiligt, men tað fær man so ikki vart seg fyri.

- At sigurin so eisini hevur givið okkum eitt atgongumerki til Europa longu nú, er sjálvandi eisini nakað, sum ger tað enn betri.

## Nýggjar tíðir

Steypasigrar er annars ikki nakað, sum tey í B36 eru von við at vinna. Súlurnar, sum spælt varð um í nógv ár, standa allar yviri hjá grannunum, eins og fyrra settið av veðrahornunum eisini gera tað. Spurdur um hetta, sigur formaðurin í B36 tó, at hetta helst fer at verða broytt framyvir.

- Nú er ein nýggj øld byrjað, og í hesari fara vit at vinna meira enn vit hava gjørt. Bæði í lands- og steypakapping, segði ein avgjørdur og glaður Kristian á Neystabø í løtunum eftir finalusigurin.



# Jákup helt tætt



**Molde styrkti eitt sindur um sína støðu, tá teir á útivølli vunnu tepran men uppibornan sigur í Moss**

ÚTISETAR
*Jóannes Hansen*

Tað hilnaðist betri hjá Jákupi Mikkelsen og Molde, tá teir sunnukvøldið spældu í Moss. 1.769 áskoðarar sóu í góða summarveðrinum ein tættan dyst, har talan var um nógvar nærdystir á miðvøllinum. Tað vóru ikki nógvir málmøguleikar, og fyri fyrstu ferð, síðani hann fyri tveimum vikum síðani kom til Noregs, megnaði Jákup Mikkelsen at halda tætt allar 90 minuttirnar.

At tað hevur týdning, at málverjin alla tíðina tekur lut í tí, sum fer fram á vøllinum, var hesin dysturin ikki minsta prógvið um.

Molde hevði tak á í 1. hálvleiki, men teir megnaðu ikki at spæla seg til upplagdar møguleikar og at fáa mál. Men miðskeiðis í 2. hálvleiki eydnaðist tað. Málmøguleikin var ikki serliga stórur, men tað gjørdist hann, tá málverjin hjá heimaliðnum var so mikið óheppin, at hann so at siga misti bóltin fyri føturnar á einum mótstøðumanni.

Í norska blaðnum VG verður Jákup Mikkelsen mettur til eitt fimm tal. Tveir av liðfeløgunum fingu seks, onkrir fingu fimm saman við Jákupi og fleiri fingu fýra.

Tað eru vónir fyri, at Molde aftur komandi sunnudag fer at ogna sær trý stig. Tá fáa teir vitjan av botnliðnum úr Tromsø. Men steypadysturin hjá Molde mikukvøldið í síðstu viku vísti, at tað ikki altíð er favoritturin, sum vinnur.

## Rosenborg í gongd aftur

Tað hevur verið tosað um kreppu í Rosenborg, sum undan vikuskiftinum ikki hevði vunnið í seks dystum upp í slag.

Nú nærkast týdningarmiklu Europa Cup dystirnir av álvara – Rosenborg skal í europeiska eldin mikukvøldið í komandi viku. Tí var við spenningi sæð fram ímóti, hvussu tað fór at hilnast ímóti botnliðnum Bodø/Glimt.

Men talan varð ikki um nakra sensatión. Rosenborg gjørdi skjótt av á heimavøllinum í Tróndheimi, har teir vunnu 4–0.

Eitt av mest merkisverdu úrslitunum í hesum umfarinum var tað, tá felagið, sum Kurt Mørkøre framvegis hoyrir til, Sogndal, á heimavølli megnaði 2–2 ímóti toppliðnum úr Lillestrøm.

# Ungu menninir stóðu royndina

**Í Klaksvík vóru teir ikki misnøgdir við spælið, men teir harmaðust um, at B36 skuldi skorað akkurát, tá teir gjørdu tað**

Tomislav Sivic, KÍ venjarin, var ikki misnøgdur við tað, sum hansara menn høvdu víst í finaluni.

– Tit gjørdu tað, sum eg hevði vónað, at tit skuldi gera. Spell var tað, at eitt mistak skuldi kosta avgerandi málið, helt venjarin, sum segði seg vera serliga glaðan fyri, at ungu menninir – Atli Danielsen, Hjalgrím Elttør og Símun Joensen – høvdu spælt so væl, sum teir gjørdu undir so vánaligum umstøðum og so stórum trýsti.

Harley Bertholdsen var ikki førur fyri at spæla. Hann var við síðstu løtuna, men nú roknar hann ikki við at vera tøkur tær næstu ferðirnar.

– Tað kom sera illa við hjá okkum, at Allan Joensen skuldi verða vøddaskaddur í síðsta spurtinum í upphitingini, men samstundis má eg siga, at Atli Danielsen stóð seg sera væl, tá hann noyddist á vøllin sum avloysari, helt veteranurin Harley Bertholdsen.

– Tað var harmuligt, at B36 fekk mál miðskeiðis í 2. hálvleiki. Eg haldi, at tað vóru onkrar ábendingar um, at teir vóru farnir at ótolnast. Longu í 1. hálvleiki skiftu Heðin, Jens Kristian og onkur annar um pláss. Tað plagar at vera tekin um, at man er ikki nøgdur. Um vit høvdu megnað at hildið tætt eina løtu afturat, so høvdu teir kanska verið eitt sindur óansnari í verjupartinum, og so er ilt at vita, hvat kundi spurst burturúr. Eingin ivi var um, at teir vóru eitt sindur betri skipaðir,enn vit vóru tað, men áðrenn teir fingu mál, høvdu teir ikki spælt seg til upplagdar møguleikar. Tað var torført hjá báðum pørtum, tí umstøðurnar vóru so vánaligar, at tað var illa fyri ikki at siga ikki spælandi, heldur Harley Bertholdsen, sum nú vónar, at avrikið í steypafinaluni kann brúkast til at fáa KÍ eitt sindur longri upp á støðutalvuni.

Næsta royndin hjá KÍ verður sunnudagin. Tá skulu teir á ovara vølli í Gundadali spæla ímóti HB.

**jh**

